Málsliga samsvarið í Færøske Folkesagn og Æventyr

Jeffrei Henriksen

Í vanligari mállæru verður kravt fall-, kyn- og talsamsvar (kongruens). Í nútíðarføroyskum er her kortini, tá ið samanum kemur, stór óvissa.

Nevnt kann verða sum dømi, at á spurnabløðum, sum 177 fólk ymsastaðni úr Føroyum svaraðu í 1984, og sum høvi vónandi verður at greiða gjøllari frá seinni, valdu 11% hvørfall (nominativ), 88% hvønnfall (akkusativ) eftir „vera" í hesum setninginum:

Hon legði hann undir at vera spitalskur/ spitalskan.

43% valdu hvørfall, 56% hvønnfall eftir „koma":

Hon legði hann undir at koma fullur/ fullan aftur til húsa.

Ikki færri enn 74% valdu hvørfall og bert 24% hvønnfall eftir „eita":

Tey mundu latið meg itið Óluva/Óluvu.

Annað dømi. Umsagnarlið (predikativ) til afturbent fornavn (refleksivt pronomen) settu um leið 15% fleiri í hvørfall, enn tey í øðrum líkum førum gjørdu, har ið umsagnarliðurin var til annað enn afturbent fornavn:

1% hvørfall / 99% hvønnfall:

Teir hildu hann liggja deyður/deyðan á gólvinum,

15% hvørfall / 84% hvønnfall:

Hann segði *seg* liggja sjúkur/sjúkan í seingini.

6% hvørfall / 93% hvønnfall:

Tey væntaðu hana at fara at vera sjúk/ sjúka,

22% hvørfall / 77% hvønnfall:

Hann helt *seg* fara at verða vitleysur/ vitleysan.

Her skal roynast afturímóti at lýsa málsliga samsvarið í *Færøske folkesagn og æventyr.* Tilvísingarnar aftan á dømini eru til blaðsíðutalið í 2. útgávu (1).

Lítið og einki verður her gjørt burtur úr tílíkum dømum, sum føroyingum eru málsliga sjálvsøgd, t.d.:

at sláa dómaran *kaldan* 31

Jákup fekk hann attur og sló hann *deyðan* við birsuni 39

Heldur ikki er stórvegis gjørt burtur úr dømum, har samsvarið ikki er sjónliga avgjørt, tó at lítil ella eingin ivi kann vera um tað:

hann heldur tað vera *loynikeypskip* 133 (hvrf./hvnf.?)

FALLSAMSVAR

Umsagnarliður

Umsagnarliður til *hvønnfalsávirki* (akkusativobjekt) stendur rímiliga í hvønnfalli. Tílíkur málburður tykir heldur tíðari í FFÆ, enn vera man í vanligum málburði nú, ið kanska heldur verður nýtt onkur umskriving:

Summir skipsmenninir vildu hava hana *dripna* alt firi eitt 553

Hon dró hann *opnan* ettir jørðini 52

Seint á sumri funnu neytakonur mannin *deyðan* úti á Fløtun, *blóðnaknan* og báðar iljaskógvarnar *brendar* undan honun 50

hann skal beina sær Karl attur so *góðan,* sum hann hevur fingið hann 287

Prestur letur einar dir upp og sær tveir menn, ógvuliga *idlfrínutar* og *trølsligar* á at líta 56

hann biður teir *vælsignaðar* seta seg upp á eitt sker 286

Risin biður hann *vælsignaðan vera* ikki at drepa seg 237

Eisini sernøvn sum umsagnarliðir til hvønnfalsávirki eftir „kalla“, „rópa“, „nevna“ standa uttan undantak í hvønnfalli:

tí kadlaði huldan konu Kristoffers *Steinsetruna* 175

Tú skalt kadla meg *Snata* 397

Tí rópaðu tey hana *fjóskonuna* 30

tey áttu ein son, sum tey rópaðu *Gutta* 343

Ein kona var, sum tey eyknevndu *„kráku“* 300

Og um enn umsagnarliðurin er tikin framum í setninginum, stendur hann í hvønnfalli:

Undarliga hevur tú kadlað meg, og Undarligi skal eg eita 403

Heldur ikki til *afturbent fornavn* verður fallið broytt:

drongurin hevði hildið seg so *siðuligan* hinar báðar næturnar 297

Hann sigir seg ikki vera væl *kunnugan* við vegin 411

Umsagnarliður til *hvørjumfalsávirki* (dativobjekt) stendur í hvørjumfalli:

her møtti hann báðun brøðrunun so ógvuliga *uppskríddun* 296

Tvey dømi eru um umsagnarlið til *stýring* (rektión). Í øðrum førinum er fallsamsvar við stýringina, í øðrum ikki:

So fer hann út at leita og rakar við hana *deyða* í brunninun 228

Tá sá kongurin, at einki batti við hana, so *vitug* sum hon var 355

Lýsingarorð (adjektiv) verður ofta heldur nýtt enn *hjáorð* (adverb):

Bóndin vildi ógvuliga *treyður* (ikki: treyðugt) lata sína bestu kúgv 310

Hann brast á *høgur* við ódnarveðri og ógvuligun brimi 130

Prinsurin situr *ovastur* við borðið 550

ein so vænur og væl klæddur maður gongur *fremstur* 254

annar inskti, at hann skuldi koma at vera *næstur* bróður sínun 292

Sama er við umsagnarliði til ávirki:

Tá ið risin hevur fingið tunnuna upp á bakið, hevur Lokki sína tunnu omaná risans og seg sjálvan *ovastan* 259

Hjáorð:

Kongur situr til borðs *næst* brúðfólkunun 300

Konginun líktist so væl á hann firi vit hansara, at hann setti hann *næst* sær sjálvun 379

Hetta visti Jósup og tók tí at ganga *øvugt* ettir rókini frá Kvíingarskarði til Oyrar 137

Sagnorð eftir „fáa" samsvarar ofta sum umsagnarliður til ávirki:

... vildi tað ikki bera til at fáa hesa grindina *rikna* inn í botn og *dripna* 178

Skálamenn fóru vestur í Vágar til at biðja Peder Arrheboe leggja sær ráð, kvussu teir skuldu fáa grindina *dripna* 178

Pápin hevði tá stóra neyð við at fáa hana *burturbeinda* 181

Men rímiliga verður eisini nýttur lýsingarháttur í hvørkikyni (supinum):

Óli fekk *dripið* báðar 100

Drongurin er hjartkiptur og biður gentuna leggja sær ráð, hvussu hann skal fáa *dripið* risan 265

Hundarnir kjá dronginun... tosa saman um at fáa *dripið* hetta trødl 361

Navnháttur og umsagnarliður eftir „fáa":

ikki fær hon hann *at vakna*... hon kærir seg..., at hon fær ikki mann sín til *at vakna*.... Hin gamli sigir tá við Vetil, at kona hansara er komin og hevur sovið hjá honun tvær nætur upp í slag, men ikki fingið hann *vaknan* 416

Í *navnháttarsamskipan* (infinitivneksus) er regluliga samsvar:

hann heldur tað vera *sjálvan hin versta* 398

hetta, sum hann heldur vera *hin hvíta steinin* 342

Hin gamli bað hana ikki lata hin lítla fara út um morgnarnar fastandi edla *knívleysan* 135

Kolbein fer til hansara og biður hann vera *vælkomnan* 249

Hon leit til viks og sá Høgna liggja *dripnan* 71

hin bað hann fara út *sjálvan* at higgja 264

hann kemur inn í hedlið og sær ta uppskríddu klótuna, sum hann heldur vera Giljonnu sína, sita so *svinna* við eldin 242

Eisini er fallsamsvar, um „at" stendur framman fyri navnháttin:

Fólk bønaðu hann ikki at fara *einsamadlan* 72

hon ... inskti hann so at standa *fastan* har úti 257

– og við fyriseting framman fyri navnháttin:

hon hevði adlar vælir sínar frammi at fáa hann til at vera *góðan* við hana 158

Rasmus hevur fót sín á sjóstúkuvelinun hjá soninun til at verja hann firi at vera *burturtiknan* av huldumanninun 124

Somuleiðis eru mong dømi um samsvar í umsagnarliði til *afturbent fornavn:*

eina birði, sum hann heldur seg vadla vera *føran* firi 47

Hann sigir seg at vera *komnan* ettir henni 377

Eftir afturbent fornavn og *herda fyriseting* (preposition) er ikki fallsamsvar:

Hin stóri og sterki Lorvíkspádl helt seg til at vera *bønarmaður* Edlinds eitt árið 208

Drongurin gav seg til at vera *húskadlur* risans 264

Eitt dømi afturat er um navnháttarsamskipan við umsagnarliði til afturbent fornavn uttan fallsamsvar:

Hann sigir seg vera *prinsurin* av Onglandi 387

2 dømi eru um umsagnarlið í nútíðar *lýsingarháttarsamskipan* (participalneksus). Í báðum førum er fallsamsvar:

Mong ár ettirsíðan skuldi ein framsíggin prestur síggja unga Guttorm gangandi *einsamadlan* í múlanun 135

teir høvdu hann liggjandi á floti *fastbundnan* 140

Lýsingarhátt sum *umsagnarlið fremst í setninginum* eru fleiri dømi um, men einans sum umsagnarlið til grundlið; og øll dømini eru um sama orðið, „komin" („afturkomin", „heimafturkomin"):

Komin nakað á veg møtir hon risanun 540

Heimatturkomnir søgdu teir konginun frá saksinun 295

Samstøðuskipan (appositión)

Diderichsen (2) skilur millum „beskrivende" og „benævnende led" ella „beskriver" og „benævner"; hitt fyrra kallar Kr. Mikkelsen (3) „navnetillæg"; Kalocsay og Waringhien (4) nevna hesi hugtøk „determinanto" og determinato". Vit fara her á líkan hátt at skilja millum „ávísingarlið" og „ávístan lið".

Kr. Mikkelsen skilur ímillum ávísingarliðirnar:

1. benævnende navnetillæg		(nevnandi ávísingarlið)
2. beskrivende	–	(lýsandi –)
3. forklarende	–	(frágreiðandi –)
4. fremhævende	–	(herðandi –)
5. sammenfattende	–	(samdráttar –)
6. opløst	–	(greinandi –)
7. inddelende	–	(skipandi –)
8. indskrænkende	–	(avmarkandi –)
9. eksempelanførende	–	(døminevnandi –)

Kalocsay og Waringhien nýta hesi hugtøk:

1. determinato+apudmeto (apozicio)
2. ekvivalentoj (apudmeto+difino)
3. anonc-vorto (determinanto)+nominacio (determinato)

– Nominacio (ávístur liður) kann vera

a) nom-esprimo (navnorðing)

b) citajo („heiti")

c) vokativo (tiltaluorð)

Nevnandi ávísingarliður er felagsnavn, helst við rúmari merking enn ávísti liðurin:

Eftir Jónasar deyða varð Beinta trúlovað við Anders Lemvigh, *hjálparpresti* á Nesi í Eysturoy 167

Um veikt bendur ávísingarliður til hvørsfall sjálvur stendur í hvørsfalli ella í hvønnfalli, er ilt at siga:

abbasonur Jenis Símunarsonar, *bónda* í Laðangarði í Sunnbø 88

Í flestum førum stendur nevnandi ávísingarliður bundin *framman fyri* ávístan lið, sum samsvarar við hann:

Teir funnu miðið *„Drunn"* 210

Giljabóndin átti eisini oynna *Lítlu Dímun* 14

í oynni *Stóru Dímun* 205

á miðinun *Gomlu Egg* 17
Gjógvin er nevnd ettir øðrun av útiløgudreingjunun, *Jóanisi* 146
kjá prestinun, *harra Dániali* 222
Tær eru frá kongaríkinun *Verðsins Enda* 410

Prestanavnbótin „harri" samsvarar eisini í hvørfalli:
harri Klæmint 61, 130 o.fl.
harri Peer 68, 83
harri Mikkjal 83

Dømið „harra Niels" 168 er misprenting í 2. útg. – 1. útg. hevur „harri Niels".

Eftir „navnið" og „søguna" sum nevnandi ávísingarlið stendur ávísti liðurin, heitið, í hvørfalli:
Tað fekk navnið *Pápaleysi* 231
Eyknevnið *Krókurin* hevði hann 4
í søguni *„Turkar í Suðuroy"* 44
í søguni *„Løgmansdóttirin í Vágun"* 177

Helst er heldur ikki samsvar í hesum døminum eftir óbundnan ávísingarlið:
Har varð hann funnin av einum seyðamanni, *Magnus,* sum var burturi í haga 65

Hetta er kortini óvist, við tað at hvørjumfals -i verður ikki altíð skoytt upp í mansnøvn:
Nú er at greina frá Eyðun 155
kjá Magnus bónda í Bø 174

Stundum er endingin við:
kjá Magnusi í Bø 175

Ávísingarliðurin „neyðardýrið" sum seinni liður stendur í hvørfalli:
Dronginun, neyðardýrið, verður idla við 398
Bóndanun er idla við, neyðardírið 262

Sum fyrri liður hevur „ólukkudýrið" rímiliga fallsamsvar við ávísta liðin:
biðja eina bøn firi sálini hjá hasun ólukkudírinun Gabba 315

Lýsandi ávísingarliður er her óbundið felagsnavn ella eftirnavn – til felagsnavn:
Jenis í Laðangarði átti ein reiðrarhest, *ein sannan útmælingshest* 10
Weyhe prestur var trúlovaður við einari prestaeinkju í Kvalbø í Suðuroy, *eini ógvuliga rættuligari konu* 217
Eitt árið... bóðu menninir á Bøgarði ein lítlan drong, *son* hin sama Andras... fara til Gutta 199
Giljabóndin hevði flítt Jenisi í Laðangarði ein kvølp *(elting)* 10
hann... læt gera eina tríbotnaða ammu *(stóra tunnu)* 299

– til fornavn
tað mátti verið lítið firi hann, *ein ungan og sterkan mann* 12

– til sernavn
á sínun tjúgunda ári, tá ið hann var farin til fugla ein dagin, sovnaði hann út av í Enninun, *einun fleygusessi* í Norðbergi 154

Samsvar *vantar* við staðanavn, har ið einki óbundið fornavn stendur framman fyri ávísingarliðin:
tey tók hon og seldi í loynd til ein mann við Kirkjar (*bílingur* í Miðvági) 172
Ein dagin, sum teir vóru útrónir á Tobbanum (*mið* hálva aðra míl til havs úr Kolturssnakki) 212

Uppi í djúpu kvíggj (*lítil dalur* uppi undir fjadlinun) slapp hon tvørtur um 129

Eftirnavn sum ávísingarliður til mansnavn í hvørsfalli stendur í hvørsfalli:
baggi Jógvans *Mortanssonar* 72
sistir Jógvans bónda *Ólavssonar* í Skúgvoy 88

Mátandi ávísingarliður:
Síðan kindi hon eitt briggjubál, *fudla grúgvuna* 242

Frágreiðandi ávísingarliður er her bundið felagsnavn (við møguligum uppískoyti), fornavn ella sernavn
– til felagsnavn:
Ikki tordi nakar at nevna „longu" (*fiskin*) firi honun 177
Møtti hann tveimun Fámningun, *Jansaguttunun báðun* 18
so festi fútin sonarsoni Klæmints, *Klæminti á Klettun,* merkurnar 64

– til sernavn:
hann var sonur Baltasar løgmann, *„Idla løgmann"* 197
Tá ið Jenis kom í Mannaskarð, fór hin oman Stovur *(hin gamla tingstaðin)* 11

Annaðhvørt ávísingarliðurin er settur millum kommu ella í klombrum, ger hetta ongan mun til samsvarið:
Ein arbeiðskona í Ónagerði, prestagarðinun á Viðareiði, kom firi leysingabadn og drap tað í loynd 225
ein arbeiðskona í Ónagerði (prestagarðinun á Viðareiði) hevði dripið eitt leysingabadn og grivið tað niður 131
– til lýsingarorð:
ikki átti hann at ganga frá teirri høgu *(Blæðingini)* 19

Fallsamsvar *vantar* í tveimum dømum, harið ávísingarliðurin er afturbeindur (relativ) eykasetningur at ávísandi (demonstrativ) fornavni við uppískoyti:
Um Kristoffer í Húsi – *hin sami,* ið var húskadlur eina tíð hjá harra Niels og koyrdi Beintu í tvagtunnuna – er frásøgn goymd 172
So rímdu tey av húsinun bæði, hon við pottinun og hann við einun hundi: *tað einasta livandi,* tey áttu ettir 357

Harafturat hava vit her ið hvussu er eitt dømi, har hvønnfall „samsvarar" við hvørsfall eftir fyrisetingina „til":
so attur til *teirra, skálkarnar* 320

Framman fyri *herðandi ávísingarlið* kann ávísti liðurin standa í øðrum falli, við tað at hann stendur í ytristøðu (ekstrapositión):
Jákup Dintil, honun er ikki at ræðast firi nú 104

Greinandi ávísingarliður hevur eisini fallsamsvar:
Hann gerdi tríggjar traðir inn *(Stóru trøð, Norðastu trøð og Tungureynstrøðna)* 183
Klæmint hevði tríggjar høvuðsmenninar í Skálavík í drikkjulagi hjá sær: Antinis í Dalsgarði, Jógvan í Skála og *ríkasta óðalsmannin* í bigdini: Hanus undir Hagabrekku, nevndur „Frænd-Hanus" 67
– enntá í hvørsfalli:
har sum tveir seyðatjóvir reiddu seyð „ímidlun fjarða" (*Skálafjarðar og Funningsfjarðar)* 106

Men ofta er her *einki fallsamsvar:*

Ávísingarliðurin greinandi fornavn:

Hann fer ettir tveimun kistun, sum hann setur á gólvið: *onnur so skínandi bjørt, onnur kolsvørt og skitin* 306

Ávísingarliðurin sernøvn:

Eitt árið slepti hann fimm veðurlombun, einun í kvørt pláss (Hóurskor, Eysturskor, *Kvannrókin stóra, Valstakkurin* og Grønaskor) 154

Tróndur... átti tríggjar sinir: Eyðun, *Heinrikur* (eyknevndur „Gorsi") og Jógvan 153

Jákup átti tveir sinir: Jógvan, kadlaður Jákups-Jógvan, og *Gutti,* síðan nevndur Gutti í Bø 200

Skipandi ávísingarliður er her sínámillumfornavn (resiprokt pronomen):

Beinta, sorinskrivaradóttir úr Havn, var gift við trimun prestun, *kvørjun* undan øðrun 166

Áðrenn teir fóru, gav pápin teimun *kvørjun* sítt glas 358

Avmarkandi ávísingarliður:

Hann sær tríggjar menn koma norður ettir kirkjugøtuni, *ein av teimun prestklæddan* og gangandi undan 62

Eitt árið slepti hann fimm veðurlombun, *einun* í kvørt pláss 154

Samnevni (synonym)

Seinni liður av samnevnum, lýsingin (difino), kann standa í hvørfalli:

av so fínum tráð sum kongurvág *(spinnilvevur)* 406

Vágbingar sendu Tofta-Regin, Sunnbingar Regin í Hørg *(„Sunnbiar-kleyvin")* 6

Her eiga vit helst eisini at seta burturúrløgudømið (ellipsuna):

Hann átti adla Blæingina (fjúrtan merkur) og helvtina av vestara Lopra, sextan merkur til saman og *fjórðingurin* av Sunnbiar bigd 6 (ikki 16 merkur og fjórðingin av bygdini!)

Tiltaluorð (vokativ) stendur, sum vera man, í hvørfalli:

Gud signi teg, *vinur mín!* 13

Javnskipan (paratagme)

Gamalt hvørsfall (genitiv) hevur á summum økjum í føroyskum skift til hvønnfall. Hetta er eisini skilligt í FFÆ:

sonur Útistovubóndans 197

sonur Baltasar løgmann 197

Um fyrisetingarnar, sum á gomlum máli stýrdu hvørsfalli, kann í stuttum (og ófullfíggjað) sigast, at stýringin framvegis stendur í hvørsfalli, har ið hon er óbundin ella óávís (indefinit), men hvønnfall verður nýtt, har ið stýringin er bundin ella ávís (definit) ella meir og minni samansett:

Javnskipað hvørsfall eru mong dømi um, t.d.:

ímidlun Kolturs og Hests 163

ímidlun Danmarkar og Svøríkis 155

Gerðagarður varð sundurfestur ímidlun Hanusar og Kristoffurs, sinir Guttorms 138

Men eftir tí, ið her er nevnt, finnast eisini mong dømi, har hvørsfall og hvønnfall eru javnskipað:

Drongur Snæbjarnar og fjóskonuna 33

ímidlun Sunnbiarhólms og landið 10

Ilt var ímidlun Kálvs og sonarkonuna (konu Haralds) 6

ímidlun teirra og mannin 202

nakað ímidlun hansara og tann mannin, ið vann bardagan í dag 277

Óávíst hvønnfall:

ilt var ímidlun Steffans og ein gandakadl suðuri í Sandoy 150

ímidlun løgmans og Sandamenn 165

ímidlun skinns og hold (klæði og kropp) 551

fjadlið ímidlun Kirkju bigd og Hattarvíkar 153

Ímidlun jarman og mannamáls skal tað vera á ljóðinun 73

Undirskipan (hypotagme)

Eisini *eftirsettur undirliður* hevur fallsamsvar:

Eina tunnu *fudla* av smøri 422

hin bað hann fara út *sjálvan* 264

Hann... átti ein útvaldan hest, *reyðan* á liti og frálíka *dúgligan* til at renna 185

funnu teir eina kistu, *rikna* inn á Gráastein 114

Men lýsingarhættirnir „kallaður" og „nevndur" standa í hvørfalli:

Hann segðist at hava mánað trødlið niður í eina gjógv, kadlað Títlingagjógv 161

Gøta liggur... tvørtur við einun heyggi, nevndur Biskupsheygur 191

Sambindingarorðsbinding

Í einum dømi um sambindingarorðsbinding er ikki fallsamsvar:

hann skal gera eina borg, javnprúða og trødlkongsins *egna,* ettir einari nátt 548

TALSAMSVAR

Talsamsvar er, sum vera man, í øllum dømunum her frammanfyri.

Skoytt kann verða uppí, at *umsagnarliður* fremst í setninginum eisini hevur talsamsvar við grundliðin.

Hóast teir eru tveir, ið renna, og sum tað skilst, stutt er ímillum báðar, verður sagt:

Komin norður í Stólpar... krivur Dalbóndin bulin. Kvørki dregur frá edla saman ímidlun báðar. *Komin* norður á Hamarsenda... torir Edlindur ikki at fara longur 207

Annað dømi havi eg hug at rokna sum misprenting:

adlir vilja svørja at vera hesun manni *trúgvur* 395

Undirliðurin „kallaður" lagar seg umframt í falli eisini í tali eftir heitinum og ikki eftir yvirliðinum í hesum dømunum:

Tólv gidlin, Mortansbøur kadlaður, fekk hann frá einari einkju á Túvuvødli 197

Umsøgn (verbal)

Har ið *mongdarfrásøgn* stendur sum grundliður og við tí, ið umrøtt er, í fyrisetingarbinding, hevur umsøgnin talsamsvar við formliga grundliðin:

Hann sá, at vadla *helvtin* av Turkunun *var feig* 38

Javnskipaður grundliður, roknaður sum ein eind, setur umsøgnina í eintal:

ostur og breyð *voldi* hennara deyð 324

víst *var* Míri og Hólmskorar fosturmamman góð 19

Somuleiðis:

tað *stendur* steik til hansara í ovninun og vín og søtar køkur á niðastu hidl í kovanun 327

Og talsamsvar er við eykagrundlið (formelt subjekt) í máliskuni:

Eina ferð *var* tað ein maður og ein kona 245, 356, 365, 402, 404

Annars er vanliga talsamsvar við rætta grundliðin:

Eina ferð *vóru* tað eini fátæk kjún 334

Eina ferð *vóru* tað tveir menn, ið búðu nær saman 419

Og ofta er eingin eykagrundliður:

Eina ferð *vóru* ein maður og ein kona 343

Eina ferð *vóru* eini fátæk kjún 358

Eina ferð *vóru* tveir risar 272

Umsøgnin „at vera" hevur talsamsvar við umsagnarlið heldur enn við *ávísingarfornavn* (demonstrativt pronomen) sum grundlið:

tvær gandakedlingar *eru* hetta 416

Eisini er talsamsvar við umsagnarliðin í hesum døminum:

fólkið, ið hann sendir við honun, *eru* harrarnir, sum hava logið uppá hann 377

Einsæristal

Tað undrar ikki sørt, at einsæris eintalslutir saman *reglufast* verða nevndir í fleirtali:

Eisini legði hesturin honun til ráds at taka *tungurnar* úr *høvdunun* á risunun, um hann møtti teimun og náddi at drepa teir 285

Bitar vóru tá í tíðini í kirkjunun; har løgdu adlir *hattarnar* uppá og tóku niður av attur, tá ið teir fóru at offra 142

Tá ið teir vóru komnir á land, fóru teir úr *húðunun* 345

KYNSAMSVAR

Eins og við talsamsvari er kynsamsvar í dømunum um fallsamsvar.

Kynsamsvar er eisini um *afturbent fornavn:*

Hon leggur seg *sjúka* 363

Øll hini eta seg *mett* og væl *sett* 340

Niðrandi verða fólk umtalað í hvørkikyni:

Kráka sigir, at her er *eitt* so ilsligt: *tað* kann ikki fara firi kong 307

Ótíggið dugdi einki at greiða frá, tá ið *tað* varð spurt, og noyddist at ganga við, kvat *tað* hevði gjørt. So varð *tað* dømt og dripið 362

Skift verður millum *málkyn* (genus) og *lívkyn* (seksus):

Eitt konufólk í Hamrabirgi, nevnt „Sneppan", livdi *einsamalt* ettir; men *hon* var vorðin so vidl og stigg, at hon fekkst ikki upp ímidlun fólk attur. 46

Eyknevnis kyn víkur fyri lívkyni:

Sunnbiarkleyvin fór *øvigur* um eina túgvu 6

Menn, ið hava skift ham, kunnu verða umrøddir sambært lívkyni:

eina nátt... droymdi hon, at trødlið er deytt av sorg um hana: *hann* liggur úttandur ettir einun stokki niðri í garðinun 418

eslið og drongurin taka at tosa saman *báðir* 394

Eisini sjótrøllakongurin verður umrøddur í kallkyni, hóast bert nevndur trøll:

Hevði *hann* fingið tey, skuldi *hann* malið tey so smátt sum mjøl, segði *trødlið* og vendi attur 549

– og huldukonan:

Tað gamla tveitir seg firi didnar og roynir at forða teimun útgonguna; men prestur sipar til *hennara* við fótinun 56

Burturúrløga (ellipsa):
drongur var tað og varð *kadlaður* Karl 284

Sínámillumfornøvn

Fyrri liður í sínámillumfornavni, „hvør", sum sipar aftur til grundliðin (subjekt), stendur í hvørfalli heldur enn at standa sum ávirki ella sum stýring:

Eina ferð... fóru teir undir at royna kvør annan 83

at oysa kvør annan undir við sjógv 139

Klæmint og sonurin Pætur (kadlaður „harri Peer") vildu altíð vera kvør ímóti øðrun 68

Vísandi aftur til ávirki (objekt) stendur „hvør" í ávirkisfalli:

Hann tekur at kaga og sær tveir menn koma inn, *kvønn* við sínun seyði 104

Áðrenn teir fóru, gav pápin teimun *kvørjun* sítt glas 358

Kynsamsvar er, har ið „hvør" er sjálvstøðugur grundliður.

Tey (drongur og genta) gingu saman, til gøtan skar sundur, og síðan fór *kvørt* sín vegin 357

Trødlini bardust inni, tí *kvørt* skildaði upp á annað 192

Men samstøðuskipað við „tey" stendur „hvør" í *kallkyni* eins og óbundið fornavn annars stendur í kallkyni, har ið talan er um fólk (ísálan, animatión):

Til skemtar fara *tey* (brúdleypsgestirnir) at siga *kvør* frá sínum ævintíri 255

Tey (drongur og genta) fáa hug *kvør* at øðrun 358

Rímiliga er ikki *talsamsvar,* soleiðis at „hvør" stendur í eintali, um enn orðið vísir aftur til fleiri:

Teir tóku tá *kvør* sínar sjey seyðir 22

SAMANUMTIKIÐ

Í nútíðarføroyskum er rættiliga stór óvissa um málsligt samsvar. Her er kannað samsvarið í Søgnum og ævintýrum Jákups Jakobsens doktara, og niðurstøðan verður, at har er við fáum undantøkum fast og regluligt samsvar í umsagnarliði, samstøðuskipan, javnskipan og undirskipan.

Samsvar er ikki eftir 1) afturbent fornavn + herda fyriseting,
2) eftir „navnið" og „søguna" sum nevnandi ávísingarlið og eftirsettu undirliðirnir „kallaður" og „nevndur" standa í hvørfalli,
3) í eftirsetta ávísingarliðinum „neyðardýrið",
4) í eftirsettum ávístum ávísingarliði til staðanavn,
5) í eftirsettum ávísandi fornavni við afturbeindum eykasetningi.
6) Greinandi ávísingarliður hevur stundum fallsamsvar, stundum ikki.
7) Seinni liðurin av samnevnum kann standa í hvørfalli.
– Harafturat finst hendinga undantak í navnháttarsamskipan eftir afturbent fornavn.

Samsvar nýtist sum vera man ikki at vera í ávístum liði í ytristøðu framman fyri herðandi ávísingarlið og er ikki í tiltaluorði (tiltaluorð stendur altíð í hvørfalli).

Har ið gamalt hvørsfall hevur skift til nútíðar hvønnfall, kunnu hesi bæði føllini standa javnskipað.

Eins og á fornmálinum hevur umsøgnin „at vera" talsamsvar við umsagnarliðin

heldur enn við ávísingarfornavn sum grundlið.

Í máliskuni „Einaferð var tað ein maður og ein kona“ stendur umsøgnin í eintali. Annars er talsamsvar við rætta grundliðin.

Einsæris eintalslutir saman verða reglufast nevndir í fleirtali.

Skift verður millum málkyn, lívkyn og ísálan.

Fyrri liður í sínámillumfornavni stendur í hvørfalli, tá ið hann sipar aftur til grundliðin, heldur enn at standa sum ávirki ella sum stýring.

Bókmentir

(1) *Jakob Jakobsen:* Færøske folkesagn og æventyr. 2. útg. H.N. Jacobsens bókahandil. Tórshavn 1961-64. (1. útg. København 1898-1901).

(2) *Paul Diderichsen:* Elementær dansk grammatik. 3. útg. Gyldendal 1962.

(3) Kr. Mikkelsen: Dansk Ordføjningslære. Genudgivet. Hans Reitzels Forlag. København 1975.

(4) *Kalocsay-Waringhien:* Plena analiza gramatiko de Esperanto. 4. útg. Universala Esperanto-asocio. Rotterdam 1980.

Jeffrei Henriksen
Føroya Læraraskúli
Frælsið 20
FR-100 Tórshavn

Summary

There is quite a degree of uncertainty about concord in modern Faroese. Concord in Jakob Jakobsens's *Færøske folkesagn og æventyr* (Faroese folktales and legends) is analysed in this article. The conclusion is that, with few exceptions, there is regular concord of case, umber and gender in the predicate, apposition, parataxis and hypotaxis.